# Vandi fyri at øll aling í Suðuroy dettur niðurfyri

**Nýggi nevndarformaðurin í Atlantic Seafarm í Suðuroy sigur, at roynt verður at finna íleggjar, sum vilja seta pening í alingina í Suðuroy. Men tað er rættiliga trupult og eydnast tað ikki, steðgar alt**

ALING
*Áki Bertholdsen*



*Tað er rættiliga trupult at finna nýggjar íleggjarar til alivinnuna í Suðuroy, so vandi er fyri, at alt steðgar, sigur Kristian Andreasen, nýggju nevndarformaður. Hann sigur, at reglan um, at útlendingar bara kunnu eiga 33% av føroyskum alibrúkum, er ein stór forðing*

**Suðuroy:** Aling hevur nú í fleiri ár verið ein týðandi partur av vinnuliga grundarlagnum í Suðuroy.

Men nú er vandi fyri, at øll aling í Suðuroy steðgar. Virksemið hjá Atlantic Seafarm umfatar bæði smoltstøð í Hovi, aling víða hvar á Vágsifirði og Trongisvágsfirði, umframt laksavirki í Vági og somu eigarar áttu eisini roykivirki í Porkeri.

Alt tað virksemið er nú komið í so svára peninganeyð, at tað er sett undir umsiting.

Leiðslan er farin frá og fyribils nýggjur stjóri er Páll Leo. Og fyribils nýggjur nevndarformaður er Kristian Andreasen, løgfrøðingur í Havn.

Og tað eru tey, sum halda, at tað boðar ikki frá góðum at løgfrøðingur er komin upp í leikin, tí tá ið ið teir koma uppí, plagdi merkja tað, at fyritøkan er uppgivin og skal avtoftast og at bara skulu royna at bjarga tí sum bjargast kann til tey, sum eiga pening til góðar í fyritøkuni, so at fíggarliga tapið verður sum minst.

Men tað avsannar Kristian Andreasen.

– Uppgávan er fyrst og fremst at royna at finna nýggjar íleggjarar til alifyritøkuna í Suðuroy, sigur hann.

Men hann sigur, at sjálvsagt er uppgáva hansara eisini at loysa teir trupulleikar sum eru og at bjarga teimum virðum, sum eru, so at tapið verður avmarkað mest møguligt.

Hann sigur, at hansara uppgáva fevnir ikki um Roykivirkið í Porkeri og tað liggur stilt í løtuni.

### Ógvuliga trupult

Og Kristian Andreasen dylir heldur ikki fyri, at hann sær tað sum eina rættiliga trupla og møtimikla uppgávu at fáa nýggjar íleggjarar at trúgva a uppá alingina í Suðuroy.

– Sum kunnugt er alivinnan jú í svárari kreppu frammanundan. ILA hevur ført til stórt bakkast nógva staðni, eisini í Suðuroynni og prísirnir eru lágir. Sostatt eru útlitini fyri alivinnuni alt annað enn góð.

Nýggi nevndarformaðurin í Atlantic Seafarm sigur, at hóast roynt verður at finna nýggjar íleggjarar, er tað enn ómøguligt at siga um, antin tað fer at bera til. Hann fær ikki so frægt sum sagt, at tað er en ávísur áhugi.

– Vit royna at fáa tey, sum fáast við aling í Føroyum, at vísa áhuga. Teir eru ikki so nógvir í tali men tað er trupult.

### Forðing fyri útlendingar

Kristian Andreasen sigur, at roynt verður eisini, at finna útlendskar íleggjarar til alivinnuna í Suðuroy.

– Men eisini tað er sera trupult og í hesum sambandi er reglan um, at útlendingar bara kunnu eiga 33% av einum alibrúki, eitt haft um beinið.

Kristian Andreasen sigur, at tað er rættiliga vónleyst at fáa útlendingar at seta munandi pening í alivinnuna uttan at teir eisini fáa ávirkan á raksturin.

– Men tá ið teir í mesta lagi kunnu eiga 33%, verða teir í øllum førum minniluta partaeigarar og undir slíkum treytum verður tað meiri enn trupult at fáa nakran at seta pening í.

– Føroyar eru eitt lítið land og tað er ógvuliga trupult at finna pening í Føroyum. Tí er hámarkið fyri útlendskum pengum upp á 33% ein forðing í hesum føri.

Hann sigur, at tað er heldur ikki væntandi, at fíggingarstovnarnir fara at reka alivinnuna framyvir.

### Krevur nógvan pening

Hann sigur, at tann, sum setir pening í, skal helst hava fíggjarliga styrki til at líta frameftir og styrki til at taka eitt bakkast, ella tvey.

Hvussu nógvan pening, alingin í Suðuroy fær brúk fyri, fyri at kunna endurreisast, vil Kristian Andreasen ikki meta um. Men hann sigur, at alivinnan krevur rættiliga nógvan pening.

Men veruleikin er, at tá ið laksurin er nóg stórur at taka, kostar hann einar 20 krónur kilo, tí tað gongur so long tí, frá tí, at smoltið er slept í ringarnar, til laksurin er nóg stórur at taka og alla hesa tíðina skal hann fóðrast og passast.

Fyri egnu rokning kunnu vit so taka eitt dømi, at skulu 3.000 tons av laksi takast, kostar tað sostatt 60 milliónir!

Tað er sum ein heilur trolari, men her er talan um livandi fisk, sum kann verða raktur av sjúku og annað mangt, so vágin er sera stórur.

Leggjast kann afturat, at í løtuni er søluprísurin so vánaligur, at alarar fáa bara 17 krónur fyri kilo. sosatt er eitt hall upp á 3 krónir fyri hvørt kilo av laksi.

Taka vit so aftur tey 3.000 tonsini høvdu tey givið 9 milliónir í undirskoti, sum marknaðurin er í løtuni.

Og tað sigur seg sjálvt, at undir slíkum umstøðum er tað serstakliga trupult at finna áhugaðar íleggjarar.

Men Kristian Andreasen leggur afturat, at nú má tað ganga hampuliga skjótt, tí á jólum er arbeiðið liðugt at taka laksin, sum er klárur at taka nú og eru nýggir íleggjarar ikki funnir tá, er vandi fyri, at alt steðgar.

Men hann leggur eisini afturat, at í alivinnuni kann tað ganga rættiliga skjótt hvønn vegin so enn er ikki at missa vónina.

# Arbeiða aftur á laksavirkinum í Vági

**– Men hitin verður stokkutur, í hvussu so er í fyrstu atløgu og smoltið, sum er sett út, sleppur ikki at veksa til laks, men skal drepast aftur**

ALING
*Áki Bertholdsen*



*Virksemið á laksavirkinum er steðga og framtíðin er púra óviss. Eini 30-40 fólk fáa tó arbeiði á virkinum. Men tað er bara til jóla og hvat ið so verður, veit ongin enn*

**Suðuroy:** Nú er aftur arbeiði á laksavirkinum í Vági.

Men í fyrstu syftu verður tað ein stokkurtur hiti, tí tað er meiri enn ivingarsamt um nøkur aling yvirhøvur verður í Suðuroy framyvir.

Og arbeiðið, sum nú verður á virkinum, er bara á sláturvirkinum, tí á sjálvum tí stóra góðskingarvirkinum, verður onki arbeiði.

Alivinnan í Suðuroy er býtt sundur í trý. Atlantic Seafarm stendur fyri alingini á sjónum. Men tað hevur tvey onnur feløg knýtt afturat sær. Tey eru felagið Hovsá, sum er smoltstøðin og felagið Suðurlaks, sum er laksavirkið á landi.

Hetta var samstundis einasta alivirki í Suðruoy, umframt smoltstøðina í Fámjin.

Eftir at teir, sum áttu alt hetta virksemið, ikki longur kláraði sínar skyldur, er øll fyritøkan umskipað og nýggjur nevndarformaður er fyribils Kristian Andreasen, løgfrøðingur í Havn.

Kristian Andreasen sigur, at tað fyrsta, sum liggur í kortunum, er at taka tann fiskin, sum er svimur í aliringunum á sjónum og sum er klárur at taka.

Hann segði fríggjadagin, at gekst sum ætlað, skuldi arbeiðið byrja í dag, men í øllum førum verður tað fyrsta dagin.

Alingin í Suðuroy hevur verið hart rakt av ILA og nógvur fiskur er deyður í ringunum.

– Í fyrstu syftu verður fiskurin tikin í alibrúkunum, sum eru rakt av ILA, sigur Kristian Andreasen. Hann sigur, at leysliga mett er talan um sløk 1.000 tons og hann væntar at tað fer at taka ein mánað at taka tann laksin.

Men hann sigur, at táið tann fiskurin er tikin, verður farið undir næsta stigið og tað verður at taka fiskin úr hinum ringunum.

Nevndarformaðurin sigur, at til alt hetta verður arbeiði hjá einum 30-40 fólkum tað mesta, sum eftir er av árinum.

### Vandi fyri at alt steðgar

Spurningurin er so, hvussu verður við alingini í Suðuroy framyvir.

– Tá ið árið er runnið, er alt tikið, sum nú kann takast og hava vit tá ikki funnið nakran, sum er áhugaður at seta pening í fyritøkuna aftur, er vandi fyri alt steðgar.

Kristian Andreasen sigur, at samstundis er als ongin avgerð tikin um, hvussu verður við góðskingarvirkinum.

Á roykivirkinum í Porkeri er alt arbeiði eisini steðga og tað liggur heilt uttanfyri hansara arbeiðsøki, so tað hevur Kristian Andreasen onki við at gera yvirhøvur.

Hann sigur, at tað er heldur ikki gjørt av, um meiri smolt at setast á sjógv og, um so verður, hvussu nógv smolt skal setast á sjógv.

– Annars er smolt longu sett út í ringar á Vágsfirði, men tað smoltið sleppur ikki at veksa til laks, tí tað skal takast uppaftur og fyribeinast.

So vítt, vit hava fingið upplýst, er talan um upp ímóti einari millión smolt, sum nú skal fyribeinast aftur.

Hann sigur, at hetta er fyri at binda um heilan fingur, tí tað eru óráð at seta molt á sjógv, so leingi framtíðin hjá alivingini í Suðuroy er so ógreið.

– Tað krevur ógvuliga nógvan pening at fáast við aling og fyrrenn vit vita, um alingini í Suðuroy yvirhøvur er lív lagað, loysir tað seg ikki at seta smolt á sjógv, sigur Kristian Andreasen.



# Stjórin og stýrið hóraðu undan

**Úrslitið av umboðsnevndarfundinum hjá SEV fríggjadagin var, at nevndin einmælt samtykti at nýmótansgera viðtøkurnar hjá felagsskapinum og gera nýggjar reglugerðir fyri stýrið. Eisini skulu innanhýsis mannagongdir leggjast í fastari legu. Hesi stig eru ein beinleiðis avleiðing av rumblinum, sum hevur verið í SEV seinastu vikurnar**

SEV
*Stefan í Skorini*



*Halgir Winther Poulsen er løgfrøðingurin, sum skal evna til nýggjar viðtøkur og reglugerðir fyri SEV. Hetta samtykti umboðsnevndin hjá SEV fríggjadagin*

*Savnsmynd*

Umboðsnevndin hjá SEV góðkendi frágreiðingina hjá stýrinum, sum hon hevði gjørt um sáttmálasamráðingarnar hjá SEV við Maskinmeistarafelagið. 44 limir atkvøddu fyri frágreiðingini, 16 ímóti og 4 atkvøður vóru blankar.

Tað var umboðsnevndarformaðurin, Hans Tausen Olsen, sum hevði kravt eina frágreiðing frá stýrinum, tí stór ivamál vóru viðvíkjandi upplýsingunum, sum stýrislimirnir høvdu fingið frá stýrisformanninum og stjóranum, tá nevndin gav formanninum heimild at skriva undir sáttmálan við maskinmeistararnar, hóast Karsten Hansen frammanundan á einum fundi munnliga hevði boðað frá, at hann ikki fór at góðkenna sáttmálan.

Dia Poulsen úr Vági, sum er stýrislimur hjá SEV, førdi fram í Sosialinum, at tá hann var við til at geva formanninum heimild at skriva undir sáttmálan, visti hann ikki av, at Karsten Hansen dagin fyri hevði boðað frá, at hann ikki fór at góðkenna sáttmálan.

Hetta stóð eisini í frágreiðingini frá stýrinum, og hann fekk stuðul frá stýrislimunum Tóri Johannesen av Sandi og Bjarta Mohr úr Havn, sum heldur ikki hildu seg hava fingið nøktandi upplýsingar. Hinir tríggir stýrislimirnir umframt formannin vóru hinvegin av eini aðrari áskoðan í hesum sambandi og hildu seg hava fingið nøktandi upplýsingar.

Endin var, at nevndin góðkendi frágreiðingina, og tískil fær henda søgan ongar beinleiðis avleiðingar fyri hvørki stjóran, Klæmint Weihe, ella stýrisformannin, Poul Arna Jacobsen.

Tá nevndin hevði góðkent hesa frágreiðingina, fall misálitisuppskotið, sum Klæminti Olsen hevði sett fram móti stjóra og stýri, burtur.

### Opnir fundir

Hans Tausen Olsen hevur verið við til at gera uppskotið um at broyta viðtøkur og seta nýggjar reglugerðir í gildi. Hann heldur, at vantandi reglugerðir og ikki nóg greiðar mannagongdir, hava millum annað verið orsøk til alt rumblið í SEV seinastu mánaðirnar.

Á einum eykafundi hjá umboðsnevndini fyrr í ár, varð samtykt at geva Klæminti Weihe eina ávaring fyri hansara leiklut í Vágatunlinum, har hann var formaður í nevndini. Henda ávaringin er nú løgd til viks, og ístaðin verður farið undir at kollvelta bygnaðin í SEV.

– SEV verður ikki at kenna aftur, tá hetta er liðugt, sigur Hans Tausen Olsen.

Tað er Halgir Winther Poulsen, advokatur, sum hevur átikið sær arbeiðið at gera nýggjar viðtøkur og reglugerðir. Hetta fer tó at taka longri tíð, og broytingarnar verða helst ikki settar í verk fyrr enn næsta ár.

Tað liggur tó í kortunum, at allir umboðsnevndarfundir skulu vera fyri opnum hurðum, so at fjølmiðlar og almenningurin sum heild kunnu fylgja betri við, hvat hendir í tí kommunala felagsskapinum.

### Minka umboðsnevndina

Ein onnur broyting, sum møguliga verður sett í verk, er at minka um umboðsnevndina. Í løtuni sita 77 fólk í nevndini, og hildið verður, at hetta er ov nógv. Kommunurnar hava ein lim fyri hvørjar nýkomnar túsund íbúgvar. T.v.s. at Saksun hevur ein lim, meðan Runavík hevur tríggjar og Tórshavnar kommuna hevur 18 limir.

– Vit fara at royna at gera eina nýggja samanseting, sum tó ikki skal hava við sær, at kommunurnar missa ræðisrættin á sínum ognum, sigur Hans Tausen Olsen. Tað er tó umboðsnevndin, sum skal atkvøða um at minka talið umboðsnevndarlimum.

SEV verður nú eisini limur í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, so at sáttmálaramráðingar í framtíðini verða førdar av hesum felagnum og ikki av beinleiðis av leiðsluni í SEV.

# SEV setir pening í alduorku

**Umboðsnevndarfundurin hjá SEV hevur samtykt at seta tríggjar milliónir krónur í eitt partafelag, sum skal kanna møguleikarnar fyri at nýta alduorku í Føroyum**

ALDUORKA
*Stefan í Skorini*

– Vit hava fingið heimild frá nevndini at stovna felagið, og vit hava sett tríggjar milliónir krónur í tað at byrja við, sigur Poul Arne Jacobsen, stýrisformaður.

Ætlanin er, at føroyska partafelagið skal samstarva við Wavegen, sum rekur eitt alduorkuverk í Skotlandi. Wavegen hevur sýnt áhuga fyri ætlanini og er sinnað at arbeiða saman við føroyska felagnum.

SEV hevur tikið stig til eina kanning av møguleikunum at gera alduorkuverk í Føroyum. Nú verður bygt víðari á hesa kanningina, sum Signar Heinesen, sum var prosjektleiðari.

Tað verður tó neyðugt við meira enn trimum milliónum krónum, um alduorkuverkið skal gerast veruleiki. Ætlanin er tí at fáa fleiri íleggjarar og møguliga almennan stuðul. Wavegen í Skotlandi fær stuðul frá stjórnini í London og hevur eisini fingið granskingarstuðul frá ES.

### Áhugaverd ætlan

Signar Heinesen, sum stóð fyri kanningini av alduorku í Føroyum, vísti á tveir ymsar møguleikar. Tann eini var at stoypa verkið út í havið á Mølini á Eiði, og hin var at gera eitt alduorkuverk í tunlum í berginum nærhendis Søltuvík.

Hendan seinna ætlanin hevur ongantíð verið roynd nakrastaðni, og tí er hon serliga áhugaverd. Hetta kann vekja áhugan aðrastaðni og møguliga knýta fleiri partar av verkætlanini.

– Tað er stór óvissa knýtt at eini slíkari ætlan, og tað er orsøkin til, at vit ikki hava sett meira pening í verkætlanina enn, sigur Poul Arne Jacobsen.

– Vit skulu gera fleiri tekniskar kanningar, sum fara at vísa, um tað er skilagott at gera eitt slíkt alduorkuverk. Síðani verður arbeitt víðari, sigur Poul Arne Jacobsen.

Mett verður, at eitt alduorkuverk sum tað í Søltuvík kostar 17 milliónir krónur at gera.



*Poul Arne Jacobsen, stýrisformaður í SEV, sigur, at tríggjar milliónir krónur eru settar í eitt partafelag, sum skal fara undir at gera eitt alduorkuverk í Føroyum*

*Savnsmynd*